VREDESTEIN DEKK

T-Trac Icetrac Snowtrac

Transport Snow
Serliga vælegnað tilvøruvognar og lítlar lastbilar. Ger, at bilurin bremsar væl í hálkuni.

Einastandandi píkadekk við heili 12 rekkjum av píkum

Sera gott vetrardekk. Vælegnað á vátum kavakløddum og glerstoyttym vegum

Sosialurin - 311820

BILVERKSTAÐ v/ Edvin Hammer
Undir Heygnum 22 • 100 Tórshavn • Tel 313378


## Skemmingsgøta 15, Tórshavn



Um hóskandi boð fæst, verður henda ogn seld.

Húsini eru bygd í 1985 og eru uml. 150 fermetrar máld uttan. Stykkið er 503 fermetrar.

Húsini eru soleiðis innrættað:
Ovari parturin: Durur, gangur, 4 kømur, baðiverilsi og wc.
Niðari parturin: Stova/køkur við útgongd til altan, spísikamar og grovkøkur/fýrrúm við vaskimaskinu og turkitrumlu.

Grasvøllur er gjørdur og grótgarður lagaður niðan fyri húsini. Stór garaga er bygd á stykkið.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna,**
**Fr. Petersensgøta 9**
**att: Fríða Patursson, adv.**
Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

Tlf. 311145

## Gráur Renault Laguna 2.0

við el-rútum, alufelgum og píkadekkum á felgum bíliga til sølu.

**Tlf. 310767 og 217406**

## Klaksvíkar Kommuna

**Barnsburðaravloysari til sosialráðgevan hjá barnaverndarnevndini:**

Eitt starv sum barnsburðaravloysari fyri sosialráðgevan hjá barnaverndarnevndini á sosialu deild hjá Klaksvíkar býráð í tíðarskeiðinum frá 1. desember 2000 til 14. juli 2001 er leyst at søkja.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
- At ráðgeva innan fyri barnaforsorgarlógina
- At ráðgeva og leiðbeina foreldrum og børnum/ungum
- At ráðgeva, leiðbeina og at gera tilmælir til barnaverndarnevndina
- At vera skrivari hjá barnaverndarnevndini
- At samstarva tvørfakliga

Umsøkjarar skulu hava sosialráðgevaraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Klaksvíkar Kommunu og Starvsmannafelagið og lønt í lønarflokki 18/22.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Tonju Ziskason, sosialráðgeva hjá barnaverndarnevndini, ella Jancy Biskopstø Klein, leiðara av sosialu deild á tlf. 456388.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal sendast til:

**Klaksvíkar Kommunu**
Postboks 2 · 700 Klaksvík
stílað til Barnaverndina/sosialu deild

Umsóknarfreist er 15.11.00.

## KUNNGERÐ um vallistar og valkort

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at vallistarnir til kommunuvalið 21. november 2000 liggja frammi til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni frá 23. oktober til 06. november 2000 í vanligari avgreiðslutíð mánadag til fríggjadag millum kl. 10.00–15.00. Somuleiðis liggur vallistin fyri Hellurnar frammi hjá Eli Jensen á Hellunum í sama tíðarskeiði.

Kæra um at onkur ikki er komin á listan, ella onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 13. november 2000.

Til kommunuvalið verða valkort nýtt, og verða hesi send veljarunum í kommununi í seinasta lagi 2 vikur undan valinum, og skal veljarin hava valkortið við sær, tá ið valt verður.

Fuglafjørður, tann 18. oktober 2000
**Fuglafjarðar býráð**

## Lýsið í Sosialinum

**Sjúkrasystraskúli Føroya**

## Skrivari

Eitt starv sum skrivari á fulla tíð er leyst til setan skjótast gjørligt.

Sjúkrasystraskúli Føroya skipar fyri sjúkrasystraútbúgving og skal komandi ár eisini skipa fyri almanna- og heilsuútbúgvingunum, ið fatar um almanna- og heilsuhjálparaútbúgving og almanna- og heilsurøktaraútbúgving. Skúlin skal somuleiðis undir nýgga roknskaparskipan.

Høvuðsuppgávur hjá skrivaranum fevna um:
- Leggja til rættis og útinna dagliga skrivstovuhaldið á skúlanum, herundir gera arkiveringsskipan og bókasavnsarbeiðið
- Bókhald- og roknskaparføring
- Vera við í arbeiðinum at menna telduskipanina
- Samskifti við leiðslu, lærarar, lesandi, næmingar og praktikstøð
- Aðrar uppgávur

Førleikakrøv:
- Útbúgving og royndir innan skrivstovuhald og journalisering/arkivering
- Royndir innan bókhald
- Kunnleika og royndir innan nýtslu av edv
- Hava málkunnleika, herundir duga væl føroyskt og enskt
- Duga at arbeiða sjálvstøðugt
- Vera fyrikomandi og duga at fáast við ung fólk
- Góð samskiftis- og samstarvsevnir

Vit bjóða:
- Eitt á mangan hátt sjálvstøðugt og áhugavert starv, sum er í menning.
  Tú kemur at starvast í einum góðum arbeiðsumhvørvi í tøttum samstarvi við leiðslu og lærarar á skúlanum.

Setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið og verður lønt í 15. lønarflokki.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Sjúkrasystraskúla Føroya**
Att. Rektaran
Eirargarður 14 B
FO-100 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 6. november 2000.
Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú venda tær til Bergliot Ihlen, rektara á telefon 316027 lokal 436.

## Hvalbiar Skúli

Søkt verður eftir vikari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá uml. 1. desember og 24 vikur fram. Tímatalið er 27 tímar um vikuna.

Lærugreinir: Tekstviðgerð 8.-9. fl., Landalæra 6.-7.-8.-9. fl., føroyskt 1.-3. fl., serundirvísing, bókasavn og flokslærari hjá 1. fl.

Starvið er tíðaravmarkað og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 6. november 2000.

Hvalbiar Skúlanevnd
v/ Conny Poulsen
FO-850 Hvalba



ELEKTRON

## Lei›ari til Systemdeildina

Høvu›suppgávan hjá systemdeildini, er at menna og vi›líkahalda tekniska platformin hjá Elektron og kundum felagsins. Harumframt luttekur systemdeildin í arbei›inum at loysa ymiskar tekniskar trupulleikar í koma í gerandisdegnum.

Tekniski platformurin er samansettur av trimum høvu›spørtum:

- Einum stórtelduumhvøri, sum í høvu›sheitinum umfatar tvær rakstrarmi›stø›ir, vi› hvør sínum høvu›sambætara og hvør sínari diskskipan.
  Diskskipaninar spegla hvørja a›ra og samskiftisútbúna›urin er settur solei›is upp, at rakstrarumhvørvi› kann skifta millum rakstrarmi›stø›irnar.
- Eitt ví›økisnet, sum fyri tí›ina ver›ur umlagt til eitt rutaragrunda› net.
- Lokalur útbúna›ur hjá Elektron og kundum felagsins, vi› NT ambætarum, arbei›sstø›um og ymiskum periferum útbúna›i.

Mesta arbei›i› í deildini ver›ur framt í smærri og størri verkætlanum, í samstarvi vi› hinar deildirnar á Elektron og vi› kundarnar.

Systemlei›arin hevur ábyrgdina av systemdeildini, har 7 fólk fyri tí›ina starvast.
Í hesum sambandi hevur systemlei›arin almennu ábyrgdina av øllum infrastrukturverkætlan-um, herímillum samstarvinum vi› inn- og útlendskar undirveitarar á økinum.

Talan er um eitt sera spennandi og ábyrgdarfult starv. Systemlei›arin skal alsamt javnviga kravi›um at fáa framt systemverkætlanir innan avtala›ar tí›arkarmar vi› tørvin fyri einum vælvirkandi, stø›ugum og tryggum rakstrarumhvørvi.

Umsøkjarar vi› hollari tekniskari útbúgving og lei›sluroyndum hava fyrimun.

### Um tú vil vita meira

Ert tú vælkomin at seta teg í samband vi› Niels Chr. Nolsøe, stjóra, á telefon 31 45 05 ella á telduposti ncn@elektron.fo.
Umsøknir skulu ver›a okkum í hendi innan 31.10 2000, og skulu stílast til Niels Chr. Nolsøe, P/F Elektron, Staravegur 9, 100 Tórshavn.

P/F Elektron er edv-veitari til almennar stovnar, peningastovnar, tryggingar og grunnar. Vit veita nærum allar tænastur innan edv til kundar okkara, herímillum kanningar av ymiskum tekniskum og handilsligum vi›urskiftum, skipanarmenning og rakstur av edv-skipanum.

Størstu partaeigarirnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsst‡ri.

**PF ELEKTRON**
STARAVEGUR 9 · P.O. BOX 219
FO - 110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 314505 - FAX: +298 316384
e-mail: info@elektron.fo

stephanssons hús

**valiant**

**Galvaniseraðir viðfestisvognar**



Sosialurin - 311820

*Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!*

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

# ÁRSINS KONSERT

## YOUTH ALIVE BAND NSW, SYDNEY AUSTRALIA









| | |
|---|---|
| 13 -14/10 | KØBENHAVN |
| 19/10 | OSLO |
| 21/10 | TRONDHEIM |
| 25/10 | MÜNCHEN |
| 27/10 | STOCKHOLM |
| 28/10 | STAVANGER |
| 29/10 | RUNAVÍK |

## ÍTRÓTTARHØLLINI Í RUNAVÍK

## SUNNUKVØLDIÐ 29. OKT. KL. 20.30

Atgongumerki á kr. 170,00 fáast á hesum Statoilstøðum: Argir, Gundadalur, Strendur, Saltangará, Klaksvík og í

**VITIN - Kristiligur Bókhandil**

Boks 162 • 600 Saltangará • tel. 44 91 62 - 21 91 62